Heilsumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	30-09-2020
Mál nr.:	20-00826-12
Málsviðgjørt:	GMM
Eftirkannað:	24. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Eftirbataheim verður strikað, hækking av heilsutrygdargjaldi úr 0,60% til 0,70%, broyting av tilskotsstiganum og broyting um hjálparráð)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)
(Eftirbataheim verður strikað, hækking av heilsutrygdargjaldi úr 0,60% til 0,70%, broyting av tilskotsstiganum og broyting um hjálparráð)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 23. desember 2011, løgtingslóg nr. 44 frá 8. mai 2012, løgtingslóg nr. 129 frá 14. desember 2012, løgtingslóg nr. 52 frá 14. mai 2013, løgtingslóg nr. 117 frá 25. september 2013, løgtingslóg nr. 13 frá 16. mars 2015, løgtingslóg nr. 67 frá 22. mai 2015, løgtingslóg 166 frá 24. desember 2015 og løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 2018 verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 6 og yvirskriftin yvir § 6 verða strikaðar.

2. § 10 verður orðað soleiðis:

"**§ 10.** Landsstýrismaðurin setur eina hjálparráðsnevnd at taka avgerð sambært reglunum í § 10, stk. 4 og 5.
Stk. 2. Hjálparráðsnevndin er mannað við trimum føstum limum: einum umboði frá Heilsutrygd, einum umboði frá Apoteksverkinum og einum umboði frá Sjúkrahúsverkinum. Harumframt einum ella fleiri serkønum limum við læknafakligari útbúgving. Heilsutrygd veitir skrivara og rindar kostnaðin av hjálparráðsnevndini.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um virksemi nevndarinnar, tá henda skal viðgera umsóknir um tilskot til hjálparráð.
Stk. 4. Heilsutrygd veitir ískoyti til hjálparráð, sum eru tilskotsheimilað í kunngerð.

Stk. 5. Heilsutrygd veitir ískoyti til hjálparráð, sum er liður í eini viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði.
Stk. 6. Ískoyti verður veitt til gjald fyri hjálparráð at nýta í sambandi við heilivág.
Stk. 7. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um hjálparráð sambært hesi grein, m.a. møguligt egingjald ella depositum fyri hjálparráð, hvussu stórt tilskot verður veitt til tað einstaka hjálparráðið, og hvørji hjálparráð tilskot verður veitt til."

3. § 18 verður orðað soleiðis:

"**§ 18.** Støddin á tilskotinum er ásett eftir tilskotsprísunum sambært § 21 til heilivág o.a., sum veittur verður sambært §§ 13-17, og sum viðkomandi persónur hevur keypt innan fyri eitt ár frá fyrsta keypi. Eitt nýtt tíðarskeið byrjar, tá viðkomandi persónur aftur keypir tilskotsheimilaðan heilivág, eftir at gamla tíðarskeiðið er farið.
Stk. 2. Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár undir 1.500 kr., verður onki tilskot veitt.
Stk. 3. Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár yvir 1.500 kr., er tilskotið:
1) 35% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.500 kr. og upp til 3.000 kr.,
2) 55% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 3.000 kr. og upp til 6.000 kr., og
3) 100% av tí partinum, sum fer upp um 6.000 kr.

Stk. 4. Børn og ung, yngri enn 18 ár, gjalda ikki egingjald.
Stk. 5. Eru útreiðslurnar hjá fyritíðarpensjónistum og persónum, sum eru fyltir 67 ár yvir 1.500 kr., er tilskotið:
1) 35% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 1.500 kr og upp til 2.000 kr., og
2) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 2.000 kr.

Stk. 6. Um ein persónur fyllir 18 ár í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 2 og stk. 3, nr. 1 til 3 fram til tíðarskeiðið endar.
Stk. 7. Um ein persónur fyllir 67 ár ella gerst fyritíðarpensjónistur í tíðarskeiðinum, verður tilskotið roknað eftir stk. 5, nr. 1 og 2 fram til tíðarskeiðið endar.
Stk. 8. 1. januar á hvørjum ári verða upphæddirnar í stk. 2-4 prístalsviðgjørdar í kunngerð."

4. § 24, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 24.** Øll, sum hava fylt 18 ár og sum eru fevnd av hesi løgtingslóg, gjalda 175 kr. um mánaðin, umframt 0,70% av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd."

5. § 29, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"§ 29. Avgerðir tiknar av Landsapotekaranum ella Hjálparráðsnevndini sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina."

6. Í § 29, stk. 2 verður "Kærunevndin í almanna- og heilsumálum" broytt til: "Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum"

7. Í § 29, stk. 3 verður "Kærunevndini í almanna- og heilsumálum" broytt til: "Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum"

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við uppskotinum er at fremja fýra broytingar í heilsutrygdarlógini. Hesar broytingar eru:

1. Strika § 6 um eftirbataheim
2. Hækka tað prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldið úr 0,60 % upp í 0,70 %
3. Útvega heimild til eina Hjálparráðsnevnd, ið skal viðgera og taka avgerðir um hjálparráð, umframt møguligt egingjald og depositum á ávís hjálparráð
4. Broytingar í tilskotsstiganum.

Samanumtikið er yvirskipaða endamálið við uppskotinum at útvega landskassanum hægri inntøkur og at tálma útreiðslunum hjá Heilsutrygd; tó við undantak av broytingini um at strika § 6 um eftirbataheim, har játtanin frá Heilsutrygdarveitingum verður flutt til játtanina hjá hvíldarheiminum Nainu á komandi fíggjarlóg.

Fyrisitingin av Hvíldarheiminum Nainu kann gerast einfaldari, um § 6 verður strikað. Eftir lógini um Heilsutrygd verður fíggjarligur stuðul veittur Hvílarheiminum Nainu, eins og tað líknandi verður gjørt við forsorgarlógini fram til 31. desember 2020. Stuðulin frá Heilsutrygd ella samsvarandi upphædd kann frameftir verða flutt beinleiðis inn á rakstrarjáttanina hjá Hvíldarheiminum Nainu. Frameftir sleppur Naina sostatt undan at senda Heilsutrygd rokningar fyri vistarhald. Innleggingar á hvíldarheimið Nainu verða antin gjørdar sum liður í sjúkraviðgerð, ella sum “rekreatiónsinnleggingar”. Lækni útfyllur innleggingarseðil, og verður har viðmerkt, um innleggingin er sum liður í sjúkraviðgerð (rekonvalisent) ella sum “rekreatiónsinnlegging”.

Fíggingin til hvíldarheimið Naina kemur frá ymiskum almennum myndugleikum og stovnum. Hvíldarheimið hevur eina árliga rakstrarjáttan á fíggjarlógini. Harafturat koma vistgjøld frá Heilsutrygd og Almannaverkinum alt eftir, hvussu læknin fyllir út innleggingarseðilin. Tað, sum síðani vantar í, verður býtt út á kommunurnar svarandi til dagarnar, íbúgvararnir í viðkomandi kommunum hava verið í heiminum. Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at henda fígging kundi verið gjørd einfaldari, og er hetta mál er nú tikið uppaftur í sambandi við

nýggju lógina um almannatrygd og vælferð, sum kemur ístaðin fyri forsorgarlógina. Í viðmerkingunum til nýggju lógina er ásett: “Forsorgarlóg heimilar sambært § 15 stk. 3 at lata fíggjarligan stuðul, tá persónur, ávístur av lækna, hevur fingið uppihald á eftirbataheimi. Heimildin er strikað við hesum lógaruppskoti. Ístaðin verða umleið 350 tús. kr. fluttar frá *Vanligari forsorg* til Hvíldarheimið Nainu á komandi fíggjarlóg.” Tí verður hildið skilagott nú at gera samsvarandi broyting í Heilsutrygdarlógini.

Útreiðslurnar til Heilsutrygd er nógv hækkaðar seinasta árið. Sambært tølum frá TAKS verður mett, at ein hækking av tí prosentvísa mánaðarliga heilsutrygdargjaldinum av tí skattskyldugu inntøkuni úr 0,60 % til 0,70 %, kann geva landskassanum umleið 11,5 mió. kr. í inntøkum afturat um árið. Við at gera broytingar í tilskotsstiganum vísa metingar frá Heilsutrygd og Landsapotekaranum, at møguligt er at lækka útreiðslurnar við umleið 8 mió. kr. í útreiðslum tey komandi árini.

Núverandi Heilsutrygdarlóg kom í gildi 22. desember 2009, og samstundis fór tann gamla skipanin við sjúkrakassum úr gildi. Nógv er broytt innan heilsutrygdarveitingar tey skjótt 11 árini, sum lógin hevur virkað. Serliga skipanin við hjálparráðum er kostnaðarmikil, og er tí neyðugt at finna eina hóskandi skipan at tálma útreiðslunum. Vit at endurskoða lógini og gera tær neyðugu tillagingar kunnu útreiðslurnar verða meira samsvarandi inngjaldinum til Heilsutrygd, og sostatt kann eisini sleppast undan, at tað er neyðugt at hækka tað mánaðarliga prosentvísa heilsutrygdargjaldið aftur í næstum.

Ein arbeiðsbólkur undir Heilsumálaráðnum við umboðnum frá Heilsutrygd, Apoteksverkinum, Landssjúkrahúsinum og Heilsumálaráðnum er eisini komin til ta niðurstøðu, at neyðugt er at seta eina nevnd, sum skal viðgera umsóknir um hjálparráð. Mett verður, at hetta í ein vissan mun kann tálma útreiðslunum til hjálparráð, og at munandi betri eftirlit eisini fæst við nýtsluni av hjálparráðnum.

1.2. Galdandi lóggáva

Í galdandi lóggávu verður Eftirbataheim nevnt í § 6. Tað er bert eitt eftirbataheim í Føroyum, og er tað hvíldarheimið Naina. Innleggingar á hvíldarheimið Naina verða antin gjørdar sum liður í sjúkraviðgerð, ella sum “rekreatiónsinnleggingar”. Lækni útfyllur innleggingarseðil, og

verður har viðmerkt, um innleggingin er sum liður í sjúkraviðgerð (rekonvalisent) ella sum "rekreatiónsinnlegging".

Fíggingin til hvíldarheimið Naina kemur frá ymiskum almennum myndugleikum og stovnum. Hvíldarheimið hevur eina árliga rakstrarjáttan á fíggjarlógini. Harafturat koma vistgjøld frá Heilsutrygd og Almannaverkinum alt eftir, hvussu læknin fyllir út innleggingarseðilin. Tað, sum síðani vantar í, verður býtt út á kommunurnar svarandi til dagarnar, íbúgvararnir í viðkomandi kommunum hava verið í heiminum. Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at henda fígging kundi verið gjørd einfaldari.

Málið bleiv tikið uppaftur í sambandi við nýggju lógina um almannatrygd og vælferð, sum kemur ístaðin fyri forsorgarlógina. Í viðmerkingunum til nýggju lógina er ásett: "Forsorgarlóg heimilar sambært § 15 stk. 3 at lata fíggjarligan stuðul, tá persónur, ávístur av lækna, hevur fingið uppihald á eftirbataheimi. Heimildin er strikað við hesum lógaruppskoti. Ístaðin verða umleið 350 tús. kr. fluttar frá *Vanligari forsorg* til Hvíldarheimið Nainu á komandi fíggjarlóg."

Sambært § 24, stk. 1 í galdandi heilsutrygdarlóg, skulu øll sum eru fylt 18 ár, og sum eru fevnd av heilsutrygdarlógini, gjalda eitt fast gjald, sum er 175,- kr. hvønn mánað umframt 0,60 % av tí skattskyldugu inntøkuni. Allir persónar, ið eru búsitandi í Føroyum, tað vil siga, sum eru skrásettir í fólkayvirlitinum at búgva í Føroyum, eru fevndir av Heilsutrygdarlógini, og hava rætt til veitingar sambært heilsutrygdarlógini.

Í § 10 í heilsutrygdarlógini er ásett, at Heilsutrygd rindar fyri hjálparráð, sum eru liður í einari viðgerð, ella sum er til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði. Eisini verður ískoyti veitt til gjald fyri hjálparráð at nýta í sambandi við heilivág. Hesi hjálparráð verða útflýggjað á apoteki ella í sambandi við viðgerð í heilsuverkinum. Heilsutrygd hevur fleiri ferð víst á hækkaðar útreiðslur til hjálparráð, eins og víst á týdningin av einum sokallaðum positivlista yvir hjálparráð, sum kunnu útflýggjast og møguligt egingjald / depositum á ávís hjálparráð. Yvirskipað sæð er hugtakið *hjálparráð* ikki væl definerað í heilsutrygdarlógini, og tískil er tað torført umsitingarliga hjá Heilsutrygd at avmarka hesi.

Sambært § 18 í heilsutrygdarlógini veitir Heilsutrygd tilskot til persónar, sum keypa tilskotsheimilaðan heilivág. Tilskot verður veitt sambært tilskotsstiganum, alt eftir hvussu nógv verður keypt fyri innan fyri eitt tilskotsár. Tilskotsstigin er settur saman eftir einum

progessivum leisti, soleiðis at borgarar, ið hava tørv á nógvum heilivági, rinda lutfalsligt minni enn tey, ið brúka lítið av heilivági. Allir borgarir, sum eftir ávísing frá lækna, keypa tilskotsheimilaðan heilivág á apotekunum kring landið, fáa tilskot. Landsapotekarin umsitur skránna við tilskotsheimilaðum heilivági, og tilskotið, sum Heilsutrygd rindar, verður frádrigið, áðrenn borgarin rindar á apotekinum. Heilsutrygd rindar síðani fyri ískoytið beinleiðis til apotekið. Tilskotið verður roknað eftir nýtsluni í einum tilskotsári, sum er tíðarskeiðið frá fyrsta keypi og 12 mánaðir fram. Næsta tilskotsár byrjar, tá ein persónur keypir fyrstu ferð, eftir at eitt tilskotsár er lokið.

Eitt ávíst egingjald er á tilskotsheimilaðum heilivági; tó rinda persónar undir 18 ár ikki egingjald. Tað merkir, at tey fáa 100 % í tilskoti av tilskotsheimilaðum heilivági. Persónar, ið eru fyltir 67 ár ella eldri og fyritíðarpensjónistar, hava lægri egingjald enn persónar millum 18 til 67 ár.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fremja fýra broytingar í heilsutrygdarlógini. Hesar broytingar eru:

1. Strika § 6 um eftirbataheim
2. Hækka tað prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldið úr 0,60 % upp í 0,70 %
3. Útvega heimild til eina Hjálparráðsnevnd, ið skal viðgera og taka avgerðir um hjálparráð, umframt møguligt egingjald og depositum á ávís hjálparráð
4. Broytingar í tilskotsstiganum.

Samanumtikið er yvirskipaða endamálið við uppskotinum at útvega landskassanum hægri inntøkur og at tálma útreiðslunum hjá Heilsutrygd; tó við undantak av broytingini um at strika § 6 um eftirbataheim, har játtanin frá Heilsutrygdarveitingum verður flutt til játtanina hjá hvíldarheiminum Nainu á komandi fíggjarlóg.

Strika § 6 um eftirbataheim

Játtanin til Hvíldarheimið Naina verður flutt frá Heilsutrygdarveitingum til játtanina hjá Nainu á komandi fíggjarlóg, og skal § 6 um eftirbataheim tískil strikast úr heilsutrygdarlógini.

Hækkan av tí prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldinum

Ætlanin er at hækka tað prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldið úr 0,60 % upp í 0,70 %. Mett verður, at henda hækkan árliga kann geva landskassanum 11,5 mió. kr. í meirinntøkum.

Hjálparráðsnevnd

Fyri at tálma útreiðslunum til hjálparráð, er ætlanin at seta eina Hjálparráðsnevnd at viðgera umsóknir frá læknum um hjálparráð. Neyðugt er tískil at seta eina nevnd við serkønum fólki, sum kunnu meta um hesar umsóknir og taka avgerð um hvørji hjálparráð, Heilsutrygd kann veita tilskot til. Í hesum sambandi skal tað eisini gerast ein kunngerð við einum sokallaðum positivlista yvir tey hjálparráð, sum tilskot verður veitt til. Umframt hetta skal egingjald ella depositum møguliga leggjast á ávís hjálparráð. Ein slíkur positivlisti verður ikki úttømandi, eftirsum nýggjar viðgerðir og hjálparráð áhaldandi verða ment, og tískil má listin javnan dagførast. Fyri at vísa fíggjarligt skynsemi má atlit takast til eina meginreglu um, at bíligasta nøktandi hjálparráði verður játtað. Um annað slag av hjálparráði verður valt, skal borgarin sjálvur rinda prísmunin.

Broyting í tilskotsstiganum

Galdandi tilskotsstigi hevur fimm stig fyri persónar í aldrinum 18 til 67 ár, eins og fýra stig fyri 67+ ár og fyritíðarpensjónistar, sí niðanfyri:

18-67 ár	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-5553	75%
5553-	100%
Gjald 2121,50	

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-2493	75%
2493-	100%
Gjald 1356,50	

Tann broytti tilskotsstigin hevur fýra stig fyri persónar í aldrinum 18 til 67 ár, og trý stig fyri 67+ ár og fyritíðarpensjónistar, sí niðanfyri:

18-67 ár	
0-1500	0%
1500-3000	35%
3000-6000	55%
6000-	100%
Gjald 3825,00	

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-1500	0%
1500-2000	35%
2000-	100%
Gjald 1825,00	

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

§ 6 um eftirbataheim verður strikað, og játtanin flutt frá Heilsutrygdarveitingum til hvíldarheimið Nainu á komandi fíggjarlóg.

Samanumtikið er endamálið við uppskotinum at útvega landskassanum hægri inntøkur og at tálma útreiðslunum hjá Heilsutrygd. Hetta kann gerast við at hækka tað prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldið úr 0,60 % upp í 0,70 %, og vil hetta geva landskassanum umleið 11,5 mió kr í eykainntøku tey komandi árini. Við at seta eina hjálparráðsnevnd, sum skal viðgera umsóknir um hjálparráð, verður mett at útreiðsluvøksturin kann tálmast. Heilsutrygd hevur havt hækkandi útreiðslur tey seinastu árini til hjálparráð, og tí er neyðugt, at munagóð tiltøk verða sett í verk.

Tilskotsstigin verður broyttur við færri stigum, og upphæddirnar fyri nær tilskot verður veitt, verða nakað broyttar, sí niðanfyri.

Galdandi tilskotsstigi

18-67 ár	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-5553	75%
5553-	100%
Gjald 2121,50	

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-2493	75%
2493-	100%
Gjald 1356,50	

Broyttur tilskotsstigi

18-67 ár	
0-1500	0%
1500-3000	35%
3000-6000	55%
6000-	100%
Gjald 3825,00	

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-1500	0%
1500-2000	35%
2000-	100%
Gjald 1825,00	

Talvan niðanfyri vísir umleið, hvussu nógv útreiðslurnar hjá Heilsutrygd verða tálmaðar árliga við at broyta tilskotsstigan sum víst omanfyri.

Upphædd vegna uppskot 4	
Vaksin	**4.991.814**
Pensionistar	**2.494.734**
Fyritíðar pensionistar	**493.048**
Børn	**0**
	7.979.596

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Av tí at hetta uppskotið hevur sera stóran skund, hevur tað ikki verið til hoyringar hjá viðkomandi hoyringspørtum.

Tó bleiv tann ætlandi broytingin um at strika § 6 um eftirbataheim gjørd fyrst fyri seg. Henda broyting bleiv gjørd í tøttum samstarvi við Heilsutrygd og Nainu, og var uppskotið við tí partinum eisini til hoyringar hjá teimum báðum pørtunum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur at flyta játtanina til eftirbataheima frá Heilsutrygdarveitingum og til hvíldarheimið Nainu á komandi fíggjarlóg.

Broytingaruppskotið um at hækka tað prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri landið við tað, at landskassin fær umleið 11,5 mió. kr. meira í inntøku um árið.

Mett verður, at Heilsutrygd árliga kann tálma útreiðsluvøksturin, um ein Hjálparráðsnevnd kann fara inn í hvørjum einstøkum føri og meta um, hvat hjálparráð borgarin skal hava, ella um borgarin hevur tørv á hjálparráði. Eisini verður mett, at ein skipan við egingjaldi ella depositum á ávís hjálparráð kann tálma teimum árligu útreiðslunum. Lagt verður upp til at Heilsutrygd skal umsita Hjálparráðsnevndina og útvega skrivara til nevndina. Um Heilsutrygd kann átaka sær hesa uppgávu innan verandi játtan og starvsfólkahópin hjá stovninum, er hetta ikki ein fíggjarlig avleiðing fyri landið. Um Heilsutrygd skal søkja eftir starvsfólki til at røkja hesar uppgávur, er neyðugt við játtan til eyka lønarútreiðslur.

Avgerðir, ið Hjálparráðsnevndin tekur, skulu kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- , familju- og heilsumálum. Kærustovnur Føroya umsitur Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum og má stovnurin meta um, hvørt kærunevndin kann átaka sær hesa uppgávuna við verandi starvsfólkahópi. Um Kærustovni Føroya tørvar eyka starvsfólk til kærunevndina orsaka av, at Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum fær eyka uppgávur álagdar, fer tað at viðføra eyka útreiðslur fyri landið.

Broytingaruppskotið um at broyta tilskotsstigan krevur broyting í KT-skipanini hjá Apoteksverkinum, og hevur hetta ein ávísan kostnað fyri Apoteksverkið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur at flyta játtanina til eftirbataheima frá Heilsutrygdarveitingum og til hvíldarheimið Nainu á komandi fíggjarlóg.

Broytingaruppskotið um at hækka tað prosentvísa, mánaðarliga heilsutrygdargjaldið hevur ikki eyka umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. TAKS krevur heilsutrygdargjaldið inn fyri heilsutrygd, og verður onki broytt tí viðvíkjandi sambært hesum uppskoti.

Tað fer at krevja eyka umsiting hjá Heilsutrygd at umsita Hjálparráðsnevndina við tað at Heilsutrygd skal útvega skrivara til nevndina. Alt eftir hvussu nógv virksemi nevndin fer at hava, kann skrivarauppgávan møguliga gerast av starvsfólki, sum stovnurin longu hevur í starvi. Tað fær møguliga umsitingarligar avleiðingar fyri Kærunevndin í Almanna-, familju- og heilsumálum at umsita kærur um avgerðir tiknar av Hjálparráðsnevndini.

Broytingin í tilskotsstiganum krevur tillaging av KT-skipanini hjá Apoteksverkinum, og krevur hetta starvsfólkaorku hjá Apoteksverkinum at gera hesar tillagingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Nei.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Broytingin í tilskotsstiganum kemur at ávirka borgarar, ið nýta heilivág, sí myndirnar niðanfyri av galdandi tilskotsstiga og tí ætlaðu broytingini:

Galdandi tilskotsstigi fyri 18 til 67 ára gomul

18-67 ár	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-5553	75%
5553-	100%
Gjald 2121,50	

Broyttur tilskotsstigi fyri 18 til 67 ára gomul

18-67 ár	
0-1500	0%
1500-3000	35%
3000-6000	55%
6000-	100%
Gjald 3825,00	

Galdandi tilskotsstigi fyri pensjónistar og fyritíðarpensjónistar

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-2493	75%
2493-	100%
Gjald 1356,50	

Broyttur tilskotsstigi fyri pensjónistar og fyritíðarsjónistar

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-1500	0%
1500-2000	35%
2000-	100%
Gjald 1825,00	

Um skipanin við hjálparráðsnevnd og egingjaldi ella depositum á hjálparráðum verður sett í verk, kann tað koma at hava ávirkan á borgarar, ið hava tørv á hjálparráðum. Væntandi verður tað soleiðis, at meginreglan verður at bíligasta, nøktandi hjálparráði verður játtað, og um lækni ella borgarin vilja hava eitt ávíst hjálparráð, kemur borgarin at rinda prísmunin.

Her verður serliga havt í huga, at borgarin møguliga ikki fær júst tað hjálparráði, sum læknin ynskir fyri borgaran, men ístaðin eitt sum er bíligari og frá einum øðrum framleiðara enn tí, sum læknin ynskir. Um egingjald ella depositum verður sett á nøkur ávís hjálparráð, verður tað ein útreiðsla hjá borgaranum, men depositum verður tó afturrindað, um hjálparráðið verður latið inn aftur í sama standi, sum tá tað bleiv útleverað.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Ongir.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Ongir.

2.9. Markaforðingar
Ongar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Nei.

2.11. Skattir og avgjøld
Nei.

2.12. Gjøld
Nei.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ja.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1
§ 6
Henda áseting verður strikað úr heilsutrygdarlógini. Broyting er bert av roknskapartekniskum slag, og kemur ikki at ávirka brúkarar av Hvíldarheiminum Nainu.

Til nr. 2
§ 10, stk. 1
Landsstýrismaðurin fær heimild til at seta eina nevnd, sum skal viðgera umsóknir um hjálparráð.

§ 10, stk. 2
Hjálparráðsnevndin skal vera samansett av umboðum frá Heilsutrygd, Apoteksverkinum og Sjúkrahúsverkinum. Harumframt skulu ein ella fleiri læknar vera við á fundunum, tá umsóknir skulu viðgerast og avgerð takast um, hvat hjálparráð tilskot kann verða veitt til.

§ 10, stk. 3
Landsstýrismaðurin fær heimild til í kunngerð at áseta nærri reglur um virksemi hjá Hjálparráðsnevndini.

§ 10, stk. 4
Heilsutrygd skal veita ískoyti til hjálparráð, sum í kunngerð eru lýst at vera tilskotsheimilaði.

§ 10, stk. 5
Heilsutrygd veitir ískoyti til hjálparráð, sum einum persóni tørvar antin í sambandi við eina viðgerð fyri varandi sjúku sum t.d. kroniska tarmsjúku, har neyðugt er at brúka stomiposar, ella í sambandi við viðgerð ella sjúku, har tørvurin á hjálparráði ikki er varandi men bert í tíðarskeiðið, sum viðgerðin ella sjúkan varir.

§ 10, stk. 6
Ískoyti verður veitt til gjald fyri hjálparráð, sum skal nýtast í sambandi við heilivág t.d. insulinsproytur ella inhalatorar til astmaheilivág.

§ 10, stk. 7
Landsstýrismaðurin fær heimild til áseta nærri reglur um ískoyti til hjálparráð v.m. í kunngerð.

Til nr. 3
§ 18, stk. 2

Onki tilskot verður veitt til keyp av heilivági, um kostnaðurin fyri heilivágskeyp í einum ári er undir 1.500 kr.

§ 18, stk. 3
Tilskot til heilivág verður ásett út frá einum progressivum leisti, soleiðis at borgarar , sum brúka nógvan heilivág, rinda lutfalsliga minni enn tey, sum brúka lítlan heilivág. Heilivágstilskotið verður roknað eins fyri allar borgarar í aldursbólkinum 18 til 67 ár. Fyri øll er galdandi, at tey sjálvi rinda allar útreiðslur upp til 1.500 kr. Síðani verður stuðulin roknaður út frá einum samsvarandi skala, soleiðis at stuðulin er 35 % fyri upphæddir millum 1.500 kr. – 3.000 kr. og 55 % fyri upphæddir millum 3.000 kr. – 6.000 kr. Um útreiðslurnar fara upp um 6.000 kr, verður 100 % latið í tilskoti; tvs. at Heilsutrygd rindar allar heilivágsútreiðslur eftir hetta, og rindar borgarin onki fyri heilivág restina av tilskotsárinum.

§ 18, stk. 4
Tilskot til heilivág verður ásett út frá einum progressivum leisti, soleiðis at borgarar , sum brúka nógvan heilivág, rinda lutfalsliga minni enn tey, sum brúka lítlan heilivág. Heilivágstilskotið verður roknað eins fyri allar pensjónistar og fyritíðarpensjónistar. Hesin bólkur rindar sjálvur allar útreiðslur fyri heilivágskeyp upp til 1.500 kr. Síðani verður 35 % latið í tilskoti til heilivágskeyp, sum kostar millum 1.500 kr. til 2.000 kr. Um útreiðslurnar fara upp um 2.000 kr, verður 100 % latið í tilskoti; tvs. at Heilsutrygd rindar allar heilivágsútreiðslurnar eftir hetta, og rindar borgarin onki fyri heilivág restina av tilskotsárinum.

§ 18, stk. 6
Um ein persónur fyllir 18 ár í einum tilskotsári, verður tilskotið roknað sambært stk. 2 og 3.

§ 18, stk. 7
Um ein persónur fyllir 67 ár ella gerst fyritíðarpensjónistar í einum tilskotsári, verður tilskotið roknað sambært stk. 4, 1) og 2).

§ 18, stk. 8
Greinin er um útjavnan av tilskotsupphæddini, sum víkur frá tí upphædd, ein persónur hevur rætt til sambært reglunum í § 18. Um tað við keypi av heilivági er veitt ov nógv tilskot, skal upphæddin útjavnast við fyrstkomandi keypi av tilskotsheimilaðum heilivági. Útjavningin kann í heilt serligum førum útsetast til næstkomandi keyp av tilskotsheimilaðum heilivági. Hetta kann serliga koma upp á tal, tá persónurin ikki hevur verið greiður yvir ov nógv goldna

tilskotið, og at hann ikki er førur fyri at rætta upp á feilin til fyrstkomandi keyp av tilskotsheimilaðum heilivági. Um persónurin hevur fingið ov lítið tilskot, verður hetta útjavnað við fyrstkomandi keypi av tilskotsheimilaðum heilivági. Um persónurin skal hava pengar útgoldnar, verður hetta gjørt við fyrstkomandi keypi av tilskotsheimilaðum heilivági.

Til nr. 4
§ 24, stk. 1
Útreiðslurnar til heilsutrygdarveitingar eru munandi øktar, og er tí eisini neyðugt at økja gjaldið, sum partvíst fíggjar hesar útreiðslur. Vit at hækka tað mánaðarligar prosentvísa heilsutrygdargjaldið úr 0,60 % til 0,70 % verður mett, at landskassin fær umleið 11,5 mió. kr. í meirinntøku um árið.

Til nr. 5
§ 29, stk. 1
Avgerðir tiknar av Hjálparráðsnevndini kunnu sambært § 29, stk. 1 kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina.

Til nr. 6

§ 29, stk. 2

Kærunevndin í almanna-og heilsumálum verður broytt til "Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum".

Til nr. 7

§ 29, stk. 3

Kærunevndin í almanna- og heilsumálum verður broytt til "Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum".

Til § 2
Broytingarnar í heilsutrygdarlógini koma í gildi 1. januar 2021.

Heilsumálaráðið, 30. september 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

/ Turid Arge
aðalstjóri

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringssvar frá fyristøðukvinnuni á Nainu
Fylgiskjal 3: Hoyringssvar frá Heilsutrygd